# Tíðarlinja

MÁL OG BÓKMENTIR

POLITIKKUR OG SAMFELAG

## Miðøld

### 600–1600:

- Elstu búsetingarnar í Føroyum eru frá uml. ár 600.
- Rúnir verða nýttar. Rúnakelvið á Eiði, uml. 900–1050.
- *Føroyingasøga* er skrivað í Íslandi í o.u. 1210–1215.
- *Húsavíkarbrøvini* frá 1407 eru fyrsta boð uppá føroyskt mál.





- *Seyðabrævið* er føroysk lóg um seyðahald, sum Erlendur biskupur í Kirkjubø læt skriva í 1298. Lógin er skrivað á norrønum.



## Upplýsingartíð

### 1600–1830:

- J. C. Svabo skrivar í 1781–82 *Indberetninger fra en Rejse i Færøe*. Svabo savnaði kvæði og gjørdi fyrstu orðabókina. Jóanes í Króki skrivaði niður uml. 10.000 kvæðaørindi.
- Fyrsta prentaða bókin, *Færøiske Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans Æt*, kemur út í 1822.
- J. H. Schrøter týðir *Evangelium Sankta Matt-eusar* til føroyskt í 1822.
- Nólsoyar Páll yrkir *Fuglakvæðið* í 1807.


Færøiske Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans Æt. Med et Anhang.

Randers 1822.







FÆROÆ & FÆROA RESERATA

Lucas Jacobson Debes

- *Færoæ & Færoa reserata* er ein lýsing av føroyskari landafrøði, sum Lucas Debes skrivaði í 1673.
- Nólsoyar Páll siglir handilsferðir til Keypmannahavnar og Bergens.

## Romantikkur

### 1830–1860:

- V. U. Hammershaimb gevur út føroysku mállæruna í 1854, sum hann gjørdi saman við Jón Sigurðssyni og Svend Grundtvig. Hann savnar eisini kvæði og gevur tey út.









Díðrikur á Skarvanesi, Mánadúgvur, 1840

- Elstu føroysku listaverkini eru tær fimm myndirnar *Mánadúgvur*, sum Díðrikur á Skarvanesi málaði í 1840.
- *Færingetidende* kemur út í 1852


FÆRINGETIDENDE.

## Tjóðskapur

### 1860–1900:

- Fyrstu fosturlandsyrkingarnar koma út í 1876.
- Fyrsti sjónleikurin verður skrivaður, og bløð koma út á føroyskum.
- Jakob Jakobsen gevur út *Færøske folkesagn og æventyr*, 1898–1901. Jakob Jakobsen, eisini róptur Jákup doktari, var fyrsti føroyski hugvísindamaðurin.

Emil A. Krause, Maður við korðum



- Í 1889 verður Føroyingafelag í Føroyum stovnað.
- Ungmannafeløg verða stovnað.
- Føroya lærarafelag verður stovnað, 1898.
- Fólkafundir verða hildnir kring landið.
- Føroya Fólkaháskúli verður stovnaður í 1899.



